# Claus og Blackpool víðari í FA Cup

Felagið hjá Claus Bech Jørgensen, Blackpool, var leygardagin partur av stóru ensku steypakappingini, FA Cup. Claus Bech Jørgensen var ikki partur av liðnum henda dagin, tá Blackpool møtti Aldershot, sum er uttanfyri ensku liguskipanini. Claus var sjúkur, og tí bar ikki til hjá honum at spæla. Liðfelagarnir hjá Claus megnaðu tó at vinna dystin 4-2, og sostatt eru teir komnir víðari til 4. rundu av FA Cup. Í gjár var lutakast til 4. rundu, og her gjørdist greitt, at Blackpool á heimavølli tekur ímóti Norwich, sum spælir eina deild omanfyri liðið hjá Claus.

# Pól heldur fram í NSÍ

Pól Thorsteinsson hevur valt at leingja um sáttmálan við NSÍ, soleiðis at hann eisini verður partur av liðnum komandi ár. Heimasíðan hjá fjepparafelagnum hjá NSÍ, guliganz.fo, visti í gjár at siga, at Pól Thorsteinsson hevur longt um sáttmálan. Sjálvt um heimasíðan hjá NSÍ enn ikki hevur tíðindini á síni heimasíðu, so váttar Pól Thorsteinsson fyri Sosialinum, at hann hevur longt um sáttmálan við NSÍ við einum ári. Eftir síðsta kappingarár var ivasamt, hvar Pól fór at halda fram, men nú hevur hann so valt at halda fram í NSÍ.



# istarnir funnir



*Við einum 2-1 sigri á Mjølni rakk ÍF akkurát finaluna í Klaksvík, men í finaluni vunnu teir trygt á SÍ, og nú bíðar Mjølnir í steypafinaluni.*



*Dráttur tryggjaði sær pláss í steypafinaluni, tá tær vunnu Mjølnir-kappingina eftir eina sera spennandi finalu ímóti ÍF.*

ingina. Teir vóru komnir í innleiðandi bólk saman við ÍF, Fleyr b og Nøvuni b, og her vann liðið hjá Føroya Studentaskúla allar dystirnar 2-0. Í hálvfinaluni møttu teir Mjølnir a, og enn einaferð vunnu teir ein sannførandi 2-0 sigur.

Í finaluni møttu teir Fleyr a, og hesin dysturin gjørdist sera spennandi. At enda vann ligið hjá Føroya Studentaskúla 2-0, og sostatt vunnu teir kappingina í 2. deild hjá monnum.

**ÍF og Dráttur í steypafinaluna**

Í meistaradeildini hjá kvinnum skuldu seks lið kappast um síðsta plássið í steypafinaluni. Seks lið, tí KÍF longu hevði tryggjað sær pláss í finaluni, samstundis sum Fleyr í steypakappingini spælir saman við liðunum í meistaradeildini hjá kvinnum.

Her vóru liðini býtt upp í tveir bólkar, har nr. 1 og nr. 2 úr hvørjum bólki fóru víðari til hálvfinalurnar. Tað eydnaðist hjá ÍF at vinna fyrsta bólkin frammanfyri SÍ og KÍF, og í øðrum bólki vann Dráttur frammanfyri Mjølnir, TB og Fleyr. Sostatt skuldi ÍF spæla ímóti Mjølni í aðrari hálvfinaluni, meðan hin hálvfinalan bleiv ein rein vágauppgerð, har Dráttur og SÍ brustu saman.

Í dystinum millum ÍF og Mjølnir eydnaðist ÍF at vinna 2-0 eftir tvey tøtt og sera spennandi sett. Í longdini gjørdist rutinan tó avgerðandi fyri ÍF, sum vann 25-23, 26-24. Hin hálvfinalan gjørdist enn meiri spennandi. Her eydnaðist tað hjá Drátti at vinna 2-1. Fyrsta sett vann Dráttu 25-18, meðan SÍ tók annað settið 18-25. So skuldi eitt avgerðandi 3. sett til, og hetta bleiv óvanliga spennandi. At enda vann Dráttur 20-18 í hesum settinum, og kvinnurnar hjá SÍ kunnu bert takka sær sjálvum fyri, at tær ikki komu í finaluna. Tær førdu nevniliga 10-2 í 3. setti, men Dráttur vísti ótrúliga góðan vilja at kempa seg innaftur í dystin.

Sostatt bleiv finalan ímillum Drátt og ÍF, og her vann Dráttur 3-2. Tær vunnu 1. sett 25-23, men so setti ÍF ferð á og vann næstu tvey settini 20-25 og 20-25. Nú sá ikki so gott út hjá Drátti, men enn einaferð vendu tær gongdini og vunnu síðsta tvey settini við settúrslitunum 25-20, 15-11. Harvið vunnu tær eisini Mjølnir-kappingina.

Hjá monnum var bara ein bólkur við fimm liðum. Kappingin var skipað á tann hátt, at tvey tey fremstu liðini í hesum bólkinum skuldu leika finalu dagin eftir. Her eydnaðist heldur óvæntað botnliðnum í meistaradeildini hjá monnum, SÍ, at vinna bólkin, meðan hørð kapping var um annað plássið. Her skuldu ÍF og Mjølnir leika síðsta dystin, og vinnarin av hesum dystinum skuldi møta SÍ í finaluni. Her eydnaðist ÍF at vinna 2-1 eftir ein sera tættan og spennandi dyst, og sostatt skuldu SÍ og ÍF møtast í finaluni.

SÍ legði hart út í finaluni, tá teir vunnu 1. sett 25-22, men eftir hetta var sum so eingin ivi um úrslitið. Síðstu trý settini vann ÍF trygt við settúrslitunum 21-25, 14-25, 20-25, og sostatt gjørdust teir vinnarar av Mjølnir-kappingini.

Nú er so greitt, hvørji mótstøðuliðini hjá KÍF og Mjølni vera í steypafinalunum tann 17. februar. Her skal KÍF leika ímóti Drátti í kvinnufinaluni, meðan Mjølnir og ÍF bresta saman í mansfinaluni, og so er bara at bíða við spenningi til tann 17. februar, tá steypavinnararnir í flogbólti vera kosnir.

## Vinnarar:

**Meistaradeild menn: ÍF**

***Innleiðandi:***

| | |
|---|---|
| ÍF – SÍ | 1-2 |
| ÍF – Fleyr | 2-0 |
| ÍF – Fram | 2-0 |
| ÍF – Mjølnir | 2-1 |

***Finala:***

| | |
|---|---|
| ÍF – SÍ | 3-1 (22-25, 25-21, 25-14, 25-20) |

**1. deild menn: Fleyr**



| | |
|---|---|
| Fleyr – SÍ | 2-0 |
| Fleyr – TB | 2-0 |
| Fleyr – Mjølnir | 2-0 |

*Her var bert ein bólkar, so Fleyr gjørdist vinnari við fullum stigatali.*

**2. deild menn: FS a**



***Innleiðandi:***

| | |
|---|---|
| FS a – ÍF | 2-0 |
| FS a – Fleyr b | 2-0 |
| FS a – Nøvan b | 2-0 |

***Hálvfinala:***

| | |
|---|---|
| FS a – Mjølnir a | 2-0 |

***Finala:***

| | |
|---|---|
| FS a – Fleyr a | 2-1 |